UTTAN ÚR HEIMI

# Nú skal Ísrael hava endaligt mark



*Ehud Olmert: – Ísrael skal hava endaligt mark í seinasta lagi í 2010*
*Mynd: Reuters*

**Vinnarin á ísraelska tjóðartingsvalinum, Ehud Olmert, sigur, at Ísrael skal hava endaligt mark innan fimm ár - við ella uttan hjálp frá palestinum**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Ísraelska demokratiið hevur talað. Ísrael vil hava Kadima, segði ein fegin Ehud Olmert, eftir at tað var vorðið greitt, at flokkur hansara hevði vunnið tjóðartingsvalið í gjár.

Sambært valnevndini fekk Kadima 28 av teimum 120 sessunum í tinginum, og Arbeiðaraflokkurin gjørdist sum væntað næststørsti flokkur við 20 umboðum. Síðani kom átrúnaðarflokkurin Shas við 13 tinglimum, høgraflokkurin Yisrael Beiteinu við 12 og at enda Likud við 11 tingmonnum. Politiskir eygleiðarar í Jerusalem vænta, at Kadima og Arbeiðaraflokkurin fara at tingast um at skipa stjórn, tí teir báðir flokkarnir eru samdir á teimum flestu týðandi økjunum. Men Arbeiðaraflokkurin verður neyvan lættur at dansa við. Flokkurin fekk eitt betri valúrslit, enn tey flestu høvdu væntað, og tí fer hann væntandi at seta fleiri krøv fyri at skipa stjórn saman við Kadima.

Ósigurin hjá Likud var størri, enn eygleiðarar høvdu roknað við, men í gjárkvøldið segði Benjamin Netanyahu, floksformaður, kortini, at hann ætlar sær at halda fram í formansstarvinum.

**Endaligt mark**

Í takkarrøðuni endurtók Ehud Olmert, at Kadima fer at fullføra ætlanina um, at Ísrael skal hava eitt endaligt landamark í seinasta lagi í 2010, og at flokkurin heldur fast um ætlanina at niðurleggja nakrar av teimum jødisku niðursetubygdunum á Vestara Áarbakka. Hann ásannaði, at sambært halgubók er Vestari Áarbakki land jødanna.

– Men veruleikin og umstøðurnar gera, at vit eru til reiðar at gera eina neyðsemju, sum ber í sær, at vit mugu lata ein part av tí elskaða landinum Ísrael frá okkum, hóast tað nívir okkum, segði Ehud Olmert millum annað.

Hann duldi ikki fyri, at Ísrael fer at fullføra sítt landamark, sama um palestinar vilja medvirka ella ikki.

– Eru palestinar ikki sinnaðir at virka fyri friði, fer Ísrael at taka sína lagnu í egnar hendur og at áseta markið eftir tingingar við USA og aðrar stuðlar.

Hamas-leiðarin Ismail Haniyeh, sum fyri stuttum varð tilnevndur palestinskur forsætisráðharri, segði í gjárkvøldið, at tað verður ikki friður í økinum, um Ísrael ásetir markið uttan at tosa við palestinar.

# Hópoyðingarvápnini høvdu einki at siga

**Longu mánaðir undan innrásini í Irak hevði George W. Bush, forseti, gjørt av at leypa á landið, sama um vápnaeftirlitsmenninir hjá ST funnu nøkur hópoyðingarvápn ella ikki**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá George W. Bush og Tony Blair hittust í Hvítu Húsunum í januar í 2003, greiddi amerikanski forsetin bretska forsætisráðharranum frá, at hann hevði gjørt av at leypa á Irak. Tað hevði ongan týdning, um vápnaeftirlitsmenninir hjá ST funnu nøkur hópoyðingarvápn í Irak ella ikki, tí USA fór at leypa á kortini, fekk Blair at vita sambært New York Times.

Uttanríkispolitiski ráðgevin hjá Blair, David Manning, skrivaði eina frásøgn frá fundinum, og skjalið bleiv stemplað sum sera loyniligt. Í tí stóð millum annað, at sambært forsetanum byrjar amerikanska álopið tann 10. mars.

– Bush sigur, at tann dagin byrjar bumbingin, skrivaði Manning í fundarfrásøgnina.

Fimm dagar eftir fundin í Hvítu Húsunum fór Colin Powell, uttanríkisráðharri, í trygdarráðið hjá ST at sannføra hini londini um øll hópoyðingarvápnini hjá Saddam Hussein. Próvtilfarið skuldi vísa, at Irak var ein hóttan ímóti altjóða trygdini, og at landið fjaldi hópoyðingarvápn.

Í fundarfrásøgnini hjá David Manning stendur eisini, at teir báðir leiðararnir vónaðu, at kríggið fór at verða stutt. Hinvegin væntaðu teir, at tað fór at taka sína tíð at umskipa Irak, men at tað fór at lata seg gera, skrivar New York Times.

## Í skúla við skammbyrsu

Ein 19 ára gamal norðmaður hevur fingið fýra mánaða fongsul, tí hann kom í skúla við einari løddari skammbyrsu. Maðurin gekk í skúla í Oslo, tá hann bleiv tikin í november í fjør. Undir avhoyringunum greiddi hann løgregluni frá, at hann hevði útvegað sær skammbyrsuna, so hann kundi verja seg.

Maðurin varð avdúkaður ein dagin, hann sat og roykti hasj stutt frá skúlanum. Ein løgreglumaður kom framvið, og tá hann skuldi kanna, hvat maðurin hevði uppi á sær, datt skammbyrsan úr einum lumma. Tað vísti seg, at seks patrónir vóru í henni.

Ákæruvaldið kravdi fongsulsrevsing og fekk viðhald í rættinum. Dómarin segði tað vera sera álvarssamt, at maðurin hevði havt eina lødda skammbyrsu við sær í skúla, og harafturat høvdu kanningarnar avdúkað, at hann hevði havt skammbyrsuna við sær í skúla fleiri ferðir. Tann 19 ára gamli bleiv samstundis burturvístur úr skúlanum, skrivar VG.

## Fartelefonin ov dýr

Í Bruxelles hevur ES-nevndin gjørt av at kanna, hvat tað kostar ar tosa í fartelefon, og endamálið er at gera tað bíligari at tosa ímillum lond.

Evroparáðið arbeiðir eisini við málinum, og fyrsta dagin kemur eitt lógaruppskot haðani, sigur BBC. Sambært uppskotinum skal tað kosta tað sama at svara einari uppringing úr útlandinum, sama hvørjum landi móttakarin er staddur í, og harafturat ætlar ráðið, at ein samrøða til útlandið skal kosta tað sama sum ein innanlendis samrøða.

Telefonfeløgini siga, at tey hava longu tikið stig til at lækka prísin. Í fleiri londum, teirra millum Danmark, hava politikarar leingi tosað um at fáa meiri einsháttað viðurskifti innan fartelefon, tí ofta eru tilboðini hjá telefonfeløgunum so torskild, at tað er at kalla vónleyst hjá fólki at síggja, hvat er tað bíligasta og besta tilboðið.



*ES heldur, at tað er ov dýrt at tosa í fartelefon*

## Weinberger deyður

Casper Weinberger, sum var verjumálaráðharri hjá Ronald Reagan, doyði fyrradagin. Hann var 88 ára gamal.

Áðrenn hann gjørdist verjumálaráðharri, hevði Weinberger verið fíggjarleiðari hjá Richard Nixon, og í tí starvinum bar hann orð fyri at ansa so væl eftir pengunum, at hann ofta bleiv umrøddur sum "Spariknívurin".

Men sum verjumálaráðharri var hann alt annað enn sparin, tí eingin amerikanskur verjumálaráðharri hevur brúkt so nógvar pengar í friðartíð sum hann. Stutt eftir at stjórnin hjá Reagan hevði tikið við í januar í 1981, eydnaðist tað Weinberger at fáa Kongressina at játta eina billión dollarar til vápn, og seinni komu nógvar milliardir dollarar afturat. Tað var eisini Weinberger, sum legði ta sokallaðu stjórnukrígsætlanina fram.

Casper Weinberger var verjumálaráðharri, tá USA og Sovjetsamveldið tingaðust um avdubbing, og hann var sannførdur um, at skuldi USA fáa russar at slaka, máttu amerikanararnir seta hart ímóti hørðum. Samstundis skuldi USA útbyggja sína vápnamegi so nógv, at Sovjetsamveldið megnaði ikki at fylgja við. Og sambært soninum fekk hann rætt.

– Vit eiga at minnast hann sum ein heimspolitikara. Tað, sum hann og Reagan gjørdu, noyddi Sovjetsamveldið á knøini, segði Casper Weinberger yngri, tá hann kunngjørdi, at pápin var deyður.